# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Merkið og samleiki

Tá føroyskir lesandi í Danmark fyri áttatiátta árum síðan á fyrsta sinni sýndu merkið fram alment, fyrst á Garði, so í Norðursælandi og fyri síðan, tann 22. juni 1919, at vinda tað á stong í Famjin, var hetta eitt so stórt framstig fyri føroysku tjóðina, at tað valla kann yvirmetast. Tjóðflaggið er samantvinnað við samleikan hjá einhvørji tjóð. Tískil stendst eisini nógv stríð um tjóðfløgg, hjá tjóðum, ið ikki hava sjálvræði. Føroyska tjóðin hevði í 1919 lítið sjálvræðið. Løgtingið var eitt danskt amtsráð og hevði sostatt bert ráðgevandi myndugleika, og føroyska málið hevði vánaligar sømdir í kirkju og í skúla.

Men tjóðin hevur støðugt ment seg, og Føroyar hava í dag munandi meira sjálvræði enn fyri áttati árum síðani. Stútt og støðugt hava vit ment okkum, soleiðis, at vit hava ræðið á einum hópi av málsøkjum. Fyrr ella seinni endar henda tilgongd við, at Føroyar gerast suverenur statur. Júst í hesum døgum leggja myndugleikarnir síðstu hondina á yvirtøkuna av fólkakirkjuni. Hetta er eitt sera stórt og týðandi mál, og eitt mála av ómetaliga stórum týdningi fyri føroyska samleikan. Tað hevur tí alstóran týdning, at hetta mál verður handfarið við góðum handalag. Her eiga vit og skil at ráða, og ansast má væl eftir, at einki verður gjørt, sum kann skapa ósemju og misnøgd millum limir fólkakirkjunnar.

Altjóðagerðin er yvir okkum. Hetta rák er ein blanding av hóttanum og møguleikum, mest snýr hetta seg tó um møguleikar. Bera vit okkum rætt at eru møguleikarnir mestsum endaleysir. Bera vit okkum skeivt at kann tað verða samleika okkara sum tjóð til miklan skaða. Vit ivast ikki í, at føroyingar fara at megna hesa avbjóðing. Í øllum hesum hurlivasa og hesum trýsti eru flagg og kirkja akkersmerki, sum vit eru góð við og sum vit eiga at fara væl um. Einki er at ivast í, at eisini hetta fer tjóðin at megna.

**Sosialurin**

# Tvær nýggjar nevndina

**Kvinnufelagið í Havn hevði ársaðalfund í Mettustovu mánakvøldið 16. apríl**

KVINNUFELAG
*Tíðindaskriv*

Tveir av nevndarlimunum, Eileen Sandá og Guðri í Bartalsstovu, stóðu fyri vali, hvørgin teirra ynskti at stilla uppaftur. Í teirra stað eru Laufey H. Blaasvær og Guðrið Joensen valdar. Tiltakslimir standa fyri vali á hvørjum ári, seinasta ár vóru Bergtóra Hanusardóttir og Berit Unn Petersen tiltakslimir, tær ynsktu ikki at halda fram. Í teirra stað eru Birna Gaard og Randi Kúrberg valdar. Hesar kvinnurnar hava ikki áður verið í nevndini hjá Kvinnufelagnum. Sostatt er øll nevndin skift út eftir eftir einum ári.

Nevndin skipaði seg soleiðis á nevndarfundi í gjár:

*Hanna Simonsen, forkvinna*
*Tina Jakobsen, næstforkvinna*
*Guðrið Joensen, skrivari*
*Gunnvá Heinesen, kassameistari*
*Laufey H. Blaasvær, nevndarlimur*
*Randi Kúrberg, tiltakslimur*
*Birna Gaard, tiltakslimur*

- Nevndin hevur longu á fyrsta nevndarfundi lagt ætlanir fyri summarið, og limir og áhugaðar kunnu við at vitja heimasíðuna: www.kvinnufelag.fo fáa dagførda kunning um tiltøk, limafundir, fyrilestrar v.m., sigur Kvinnufelagið í tíðindaskrivi.

- Kvinnufelagið hevur eina langa og stolta søgu, og nývaldu nevndarlimirnir taka uppgávuna á seg við takksemi og stórstu virðing fyri tí stóra arbeiðið, sum fyri er slóðað, sigur felagið.




*Aftast frá vinstru: Birna Gaard tiltakslimur, Randi Kúrberg tiltakslimur, Hanna Simonsen, forkvinna*
*Framman frá vinstru: Laufey H. Blaasvær nevndarlimur, Tina Jakobsen næstforkvinna, Guðrið Joensen, skrivari.*
*Gunnvá Heinesen, kassameistari, væntar á myndini*

# Stórsligin konsert við Nes Sóknar Musikkfelag

Tónleikur

Sunnudagin 29. apríl klokkan 19.00 verður konsert við Nes Sóknar Musikkfelag í Glyvra skúla. Talan er um eina afturvendandi konsert, ið hornorkestrið hevur á hvørjum ári sum liður í fyrireikingini til árligu Musikkstevnuna, sum í ár verður í høvuðsstaðnum 5. mai.

Nes Sóknar Musikkfelag er væl mannað við blásarum – eldri sum yngri – frá øllum Skálafjørðinum, samstundis sum blásarar eru úr Oyndarfirði og úr Funningsfirði.

Árliga konsertin í Glyvra skúla verður eins og undanfarin ár. Hornorkestrið kemur at spæla fýra løg, sum eru á skránni til Musikkstevnuna, umframt at onnur løg eisini verða spæld.

Nes Sóknar Musikkfelag verður ikki einsamalt á konsertini, tí høvi verður somuleiðis at hoyra ein blásarabólk, sum er mannaður við dirigentinum Ken Jones og nøkrum av hansara næmingum úr Havn.

Tónleikurin til konsertina sunnudagin klokkan 19.00 verður hesin:

Castell Caerfili, Give me the simple Life (althornsolo: Jóngerð Juul Olsen), Mountains O'Mourne (euphoniumsolo: Rebekka Hjørleivsdóttir), Rocky, Castell Caerdydd, Aladdin, The Chieftain, A Swinging Safari, Einki er sum summarkvøld við Strendur, Beauty and the Beast og Hey, Look me over.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.